# Stjóri til TRYGD




## Vit leita eftir stjóra, ið miðvíst og við umhugsni kann leiða felagið enn longri fram á leið.

Trygd er eitt nýmótans tryggingarfelag, ið kann bjóða nærum øll sløg av skaðatryggingum innan privattryggingar, vinnutryggingar og sjóvátryggingar.

Trygd varð stovnað í 1932. Føroya Banki eigur allan partapeningin í felagnum. Trygd er eitt fíggjarliga sterkt felag, sum í 2006 hevði tryggingargjøld á 72 mió. kr. Við ársenda 2006 var eginognin 97 mió. kr. Felagið hevur um 30 dugnalig starvsfólk knýtt at sær.

Trygd hevur havt vaksandi úrslit seinastu árini, og vit vilja framhaldandi økja um hesi.

**Starvið krevur,** at tú brennir fyri at skapa vøkstur og úrslit. Somuleiðis hevur tú evnini til strategiska leiðslu, umframt tað at leiða starvsfólk.

**Tú hevur** hægri útbúgving frá góðkendum lærustovni ella samsvarandi royndir at stjórna eini fyritøku. Kunnleiki til tryggingarvirksemi er fyrimunur, men tó eingin treyt.

**Sum persónur** sýnir tú opinleika, treysti og ein kveikjandi hugburð. Tú dugir at samráðast og vegleiða og finnur íblástur frá innihaldinum í starvinum, ið er ein samanseting av rakstrarligari ábyrgd og menning av felagnum. Tú sýnir eisini fjølbroytni, tá tað snýr seg um menniskjaligar relatiónir.

**Sum stjóri** hevur tú beinleiðis ábyrgd av dagliga rakstrinum av felagnum og skalt tryggja framhaldandi menningina. Tú verður berandi megin í felagnum og gevur í dagliga yrkinum íblástur til viðskiftafólk, starvsfólk og eigara.

**Setanarviðurskiftini** verða avtalað millum teg og nevndina í felagnum.

**Send umsókn tína** við CV til: Janus Petersen, nevndarformann, c/o Føroya Banki, Húsagøta 3, Postboks 3048, FO-110 Tórshavn.

**Meiri fæst at vita** við at seta seg í samband við Bjarka Mohr, starvsfólkaleiðara, á tel. 330 330 ella á bm@foroya.fo.

REPROZ

**UMSÓKNARFREISTIN ER 24. SEPTEMBER 2007**

TRYGD
leitar eftir tær.

STARVSLÝSING

## Hevur tú skapanargleði og hugflog, og vilt tú síggja úrslit av tínum arbeiði?

So hevur Landsverk fýra spennandi og avbjóðandi størv, tú kanst søkja, har tú saman við dugnaligum starvsfeløgum kanst geva títt íkast til framhaldandi menning av okkara tænastum.

### Deildarleiðari til bygningadeildina

Høvuðsuppgávur
- greina og raðfesta nýbygging og viðlíkahald við atliti at funktionaliteti, estetikki og góðsku
- góðkenna verkætlanir og taka støðu til møguligar broytingar, umframt viðgera onnur byggimál, har bygging, bygningar, lendi og formlist eru partur av viðgerðini
- arbeiða og uppbyggja ein politikk fyri almenna byggilist
- fyrireika og samskipa landsbyggireglugerð fyri Føroyar
- stuðla og menna eitt kreativt arbeiðsumhvørvi

Førleikakrøv
Tú ert útbúgvin arkitektur. Leiðsluroyndir og aðrar royndir frá verkætlanum innan byggivinnuna er ein fyrimunur.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Oyvind Brimnes, stjóra, á 540 801 ella á ob@lv.fo.

### Verkfrøðingur til framleiðsludeildina

Høvuðsuppgávur
- yvirskipaður rakstur av skervverkunum saman við formonnunum á verkunum kring landið
- skipa fyri viðlíkahaldi og dagføring av verkunum
- kostnaðarmeta og eftirkalkulera asfalt- og verklagsarbeiðir

Førleikakrøv
Tú ert útbúgvin verkfrøðingur, ella hevur aðra viðkomandi útbúgving.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Torkil Olsen, deildarleiðara, á 540 841 ella á to@lv.fo

### Verkfrøðingur/Arkitektur/Byggifrøðingur til verkleiðsludeildina

Høvuðsuppgávur
- byggileiðsla
- aðrar byggiharrauppgávur, t.d. prosjektstýring

Førleikakrøv
Tú ert útbúgvin verkfrøðingur, arkitektur, byggifrøðingur, ella hevur aðra viðkomandi útbúgving. Royndir innan viðkomandi virkisøki gevur fyrimun.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Kristian Rasmussen, deildarleiðara, á 540 851 ella á kr@lv.fo

### Smiðjuformaður til maskinmiðstøðina

Høvuðsuppgávur
- leiða og reka smiðjuna í Kollafirði
- umvælingar av amboðum
- ábyrgd av seramboðum
- útleigan av amboðum innanhýsis
- viðlíkahald av ferjulegum

Førleikakrøv
Tú ert útbúgvin maskinmeistari, ella hevur aðra viðkomandi útbúgving og helst royndir innan økið. Góður teldukunnleiki og vanligt koyrikort krevst.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Jóan Petur Patursson, rakstrarleiðara, á 540 950 ella á jpp@lv.fo

### Setanartreytir
Løn og setanartreytir eru sambært sáttmálunum millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

### Umsóknir
Umsóknir við prógvum og CV skulu vera okkum í hendi 8. oktober. Merkið umsóknina ávikavist:
Starv á bygningadeildini · Starv á framleiðsludeildini · Starv á verkleiðsludeildini · Starv á maskinmiðstøðini

*Landsverk er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvallamál, herundir tyrlupallar.*

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK *byggir land*